KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Klaksvíkar Býráð

Dagfesting:	30.04.2015 kl. 17:30
Málnr.:	13/00245 (Gerðabók)
Nevndarlimir:	Jógvan Skorheim, Steinbjørn O. Jacobsen, Gunvá við Keldu, Óluva Klettskarð, Jóhann Lützen, Kristian Eli Zachariasen, Signhild V. Johannesen, Eyðstein Ó. Poulsen, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, Atli S. Justinussen og Herfrí J. Sørensen
Onnur:	Tummas T. Eliasen, kommunustjóri
Protokollførari:	Jensa Anthoniussen, stjórnarskrivari

Málsyvirlit		
Til viðgerðar		
26/15	14/00204-15	Útlendingar vælkomnir í Klaksvíkar Kommunu
27/15	14/01010-3	Hækking av fráferðaraldri hjá starvsfólkum í Kl. komm.
28/15	15/00270-1	Akfar til gongubreytartoymið - *flt. ml. konti, fyrra viðgerð*
29/15	15/00139-1	Raðfesting av íløguarbeiðum í 2015, Klaksvíkar Havn - *eykajáttan, seinna viðgerð*
30/15	15/00310-2	Umsókn um sundurbýti - matr. nr. 604 - Finnbjørn Vang
31/15	14/00862-6	Framtíðar skipan av stovninum - Sjálvsognarstovnurin Mylnuhúsið
32/15	12/01172-67	Stroyming av býráðsfundum, eftirmeting, apríl 2015

26/15
14/00204 Útlendingar vælkomnir í Klaksvíkar Kommunu

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Fíggjarnevndin	28.04.2015	23/15	
2 Klaksvíkar Býráð	30.04.2015	26/15	

Frágreiðing um málið:
Víst verður til skriv frá umsitingini, dagfest 24-04-2015, har millum annað greitt verður frá verkætlanini hjá David Im, integratiónsráðgeva, við at fáa klárlagt og staðfest trivnaðin og vavið av útlendingum í Klaksvík, og hvat kann gerast fyri at økja um trivnaðin og integratión av útlendingum.

Í víðari tilgongdini er ætlanin, at seta í verk onkur av teimum í integratións-politikkinum tilmæltu átøkum, samstundis sum kannað verður, um aðrar kommunur møguliga eru áhugaðar í at keypa tænastur og ráðgeving til at seta í verk ein integratiónspolitikk í teirra lokalsamfelag.

Fíggjarligar avleiðingar:
Til tess at útvega meirfígging frá øðrum viðkomandi aktørum, hava fundir verið við landsstýrismannin í útlendingamálum, og við privatar vinnufyritøkur, og vísir tað seg, at tað bæði frá landsstýrisins og vinnunnar síðu er stórur áhugi í teimum áhugaverdu úrslitum og viðkomandi tilmælum, sum verkætlanarleiðarin er komin til í sínum uppskoti um integratiónspolitikk fyri Klaksvíkar kommunu.

Avtalað er við David Im, at hann fyribils heldur fram við verkætlanini til og við juli mánað – við møguleika fyri víðari framhaldi, alt eftir fígging.

Lógargrundarlag:
Einki beinleiðis lógargrundarlag er, men av tí at talan er um eitt generelt almannagagnligt tiltak, sum viðvíkur øllum útlendingum í kommununi, metir umsitingin ikki, at hetta er í stríð við heimildir kommununnar innan kommunustýrislógina og kommunufulltrúina.

Tilmæli:
Mælt verður fíggjarnevndini og býráðnum til at taka undir við tilmælinum um integratiónspolitikk fyri Klaksvíkar kommunu og tí víðari tilgongd í málinum, sum lagt verður upp til í hesum tilmæli.

Nevndarsamtyktir:
FíN 28-04-2015: David Im legði fram um arbeiði sítt við integratión. Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 24-04-2015.

Býráðsins samtykt 30-04-2015:
Einmælt samtykt at taka undir við FíN 28-04-2015.

27/15
14/01010 Hækking av fráferðaraldri hjá starvsfólkum í Kl. komm.

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Fíggjarnevndin	28.04.2015	26/15	
2 Klaksvíkar Býráð	30.04.2015	27/15	

Frágreiðing um málið:
Vístur verður til skriv frá umsitingini, dagfest 23. apríl 2015.
Uppskot er komið um hækking av fráferðaraldurin hjá starvsfólkum í Klaksvíkar kommunu. Orsøkin til hetta uppskot er, at eldraøkið nú er flutt til kommunurnar, og Klaksvíkar kommuna í hesum sambandi hevur yvirtikið áleið 150 starvsfólk frá tí almenna, har fráferðaraldurin er 70 ár.

Lógargrundarlag:
Vístur verður til rundskriv frá Fíggjarmálaráðnum 1. apríl 2013 um fráfaringaraldur.
Í §1 er ásett, at fráfaringaraldurin hjá sáttmálasettum almennum starvsfólki verður framhaldandi sum høvuðsregla 70 ár.

KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Fíggjarligar avleiðingar:
Um søkjast skal eftir nýggjum starvsfólki í viðkomandi starv, so hevur hetta í flestu førum ikki stórvegis fíggjarligar avleiðingar. Men ein fíggjarlig avleiðing kann verða, at starvsfólk við høgum starvsaldri í ávísum førum hava hægri lønarannicitet enn eitt yngri starvsfólk.
Í ávísum førum kann talan eisini verða um náturliga frágongd, tvs. at ætlanin er ikki at seta fólk aftur í viðkomandi starv, tí tørvur ikki er á tí.

Tilmæli:
Skipanin í Klaksvíkar kommunu hevur virkað væl. Nærum øll starvsfólkini søkja um at halda áfram, og verður hetta í flestu førum játtað teimum, um hetta letur seg gera.

Um hildið verður fast um, at fráferðaraldurin skal vera 67 ár, mælir umsitingin til, at fylgjandi orðing í starvsfólkareglugerðini so verður broytt:

Frá: *At starvsfólk verða søgd úr starvi, tá tey fylla 67 ár, men kunnu søkja um at halda áfram til tey eru 70 ár, men skulu tey loysast úr starvi, tá tey fylla 70 ár.*

Til: *At starvsfólk verða søgd úr starvi, tá tey fylla 67 ár, men kunnu søkja um at halda áfram til tey eru 70 ár, og um umstøðurnar á arbeiðsplássinum loyva tí, verður hetta játtað teimum. (skal leggjast afturat), men skulu tey loysast úr starvi, tá tey fylla 70 ár.*

Tað kann verða óheppið, at ikki øll starvsfólk kommununnar eru undir somu setanartreytum, og kann hetta møguliga fara at geva ónøgd.

Tá starvsfólk, ið starvast hjá NBH ikki hava fyri neyðuni at søkja um at halda áfram í starvinum, tá tey fylla 67 ár, so ber hetta við sær, at Klaksvíkar kommuna ikki viðger øll starvsfólk eins, og er hetta ikki góður starvsfólkapolitikkur.

Klaksvíkar kommuna arbeiðir við at orða politikkir á ymsu økjunum; eisini á starvsfólkaøkinum verður arbeitt við at orða ein greiðan starvsfólkapolitikk.
Um samtykt verður at hækka fráferðaraldurin til 70 ár, viðførir tað, at sama mannagongd kann verða nýtt mótvegis øllum starvsfólkum, sum eru starvssett hjá Klaksvíkar kommunu.

Málið verður lagt fyri fíggjarnevndina til umrøðu og støðutakan um fráferðaraldurin framvegis skal vera 67 ár ella skal broytast til 70 ár.

Nevndarsamtyktir:
FíN 28-04-2015: Ein meiriluti, Jógvan Skorheim, Óluva Klettskarð, Eyðstein Ó. Poulsen og Atli S. Justinussen, tekur undir við, at fráferðaraldurin verður 70 ár, og at somu reglur sum tær hjá NBH verða galdandi.
Ein minniluti, Signhild V. Johannesen, tekur støðu í býráðnum.

Býráðsins samtykt 30-04-2015:
Einmælt samtykt at taka undir við meirilutanum í FíN 28-04-2015.

28/15
15/00270 Akfar til gongubreytartoymið - *flt. ml. konti, fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Tekniska Nevnd	22.04.2015	15/15	
2 Fíggjarnevndin	28.04.2015	31/15	
3 Klaksvíkar Býráð, *fyrra viðgerð*	30.04.2015	28/15	
4 Klaksvíkar Býráð, *seinna viðgerð*	28.05.2015		

Frágreiðing um málið:
Víst verður til skriv frá umsitingini, dagfest 9. apríl 2015, har greitt verður frá støðuni á bila- og maskinpark kommununnar. Tørvur er á at skifta út og umfordeila nøkur akfør.

Fíggjarligar avleiðingar:
Um tikið verður undir við málinum, verður avleiðingin tann, at rakstrarsíðan á fíggjarætlanini fyri 2015 lækkar við kr. 350.000,-. Samstundis hækkar íløgusíðan við somu upphædd kr. 350.000,-, og verður peningurin saman við upphæddunum frá Vegir Íløgur og Kirkjugarður Íløgur, kr. 300.000,- fluttur til konto Maskinur Íløgur, har kr. 650.000 gerast tøkar til keypið.
Málið viðførir sostatt til eina broyting av fíggjarætlanini fyri 2015, og skal málið tí samtykkjast 2 ferðir av býráðnum, og Fíggjarmálaráðið skal kunnast.

Tilmæli:
Við hesum verður málið lagt fyri nevndir og býráð til viðgerðar og støðutakan.

Nevndarsamtyktir:
TN 22-04-2015: Nevndin tekur undir við málinum og við neyðugu broytingini av fíggjarætlanini.

FíN 28-04-2015: Nevndin tekur undir við TN 22-04-2015.

Býráðsins samtykt 30-04-2015:
Einmælt samtykt at taka undir við TN 22-04-2015 og FíN 28-04-2015.

29/15
15/00139 Raðfesting av íløguarbeiðum í 2015, Klaksvíkar Havn - *eykajáttan, seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Havna- og Vinnunevndin	19.02.2015	6/15	
2 Fíggjarnevndin	24.03.2015	17/15	
3 Klaksvíkar Býráð, *fyrra viðgerð*	26.03.2015	21/15	
4 Havna- og Vinnunevndin	21.04.2015	14/15	
5 Klaksvíkar Býráð, *seinna viðgerð*	30.04.2015	29/15	

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum 26. mars 2015.

Nevndarsamtyktir:
HaVN 19-02-2015: Ein meiriluti, Óluva Klettskarð, Kristian Eli Zachariasen, Steinbjørn O. Jacobsen og Herfrí J. Sørensen tekur undir við tilmæli frá Umsitingini 11-02-2015. Ein minniluti Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur tekur støðu í býráðnum

FíN 24-03-2015: Ein meiriluti, Jógvan Skorheim, Óluva Klettskarð og Signhild V. Johannesen, tekur undir við meirilutanum í HaVN 19-02-2015. Ein minniluti, Atli S. Justinussen og Eyðstein Ó. Poulsen, tekur undir við íløguavsetingini og mælir til at halda fast við upprunaætlanina at byggja nýggja havnaskrivstovu í Norðhavnini.

BýR 26-03-2015: Atkvøtt varð um tilmælið frá minnilutanum í FíN 24-03-2015. Tað fall við 5 atkvøðum fyri - Gunvá við Keldu, Eyðstein Ó. Poulsen, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, Atli S. Justinussen og Herfrí J. Sørensen - og 6 ímóti - Jógvan Skorheim, Steinbjørn O. Jacobsen, Óluva Klettskarð, Jóhann Lützen, Signhild V. Johannesen og Kristian Eli Zachariasen.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í FíN 24-03-2015. Tað varð samtykt við 6 atkvøðum fyri - Jógvan Skorheim, Steinbjørn O. Jacobsen, Óluva Klettskarð, Jóhann Lützen, Signhild V. Johannesen og Kristian Eli Zachariasen - og 4 ímóti - Gunvá við Keldu, Eyðstein Ó. Poulsen, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur og Atli S. Justinussen - og 1 blankari atkvøðu - Herfrí J. Sørensen.

Málið (skjal nr. 15/00139-5) var aftur til viðgerðar í HaVN 21-04-2014

Frágreiðing um málið:
Avvarðandi nevndir og Býráð hava samtykt eina raðfesting av íløgunum hjá Klaksvíkar Havn. Av hesum bleiv kr. 1 mill. sett av til bátabrúgvar.

Eftir avtalu við formannin í HaVN bleiv arkitekturin, ið hevur gjørt uppskotið til miðbýin, spurdur um at koma við hugskoti um, hvussu økið við bátabrúgvarnar kundi skipast.

Eitt uppskot kom í mars, og hevur formaðurin sent hetta til allar býráðslimir síðan seinasta fund.

Tá talan var um hugskot, bleiv tíðarnýtlsan til arbeiðið hjá arkitektinum meiri, enn mett varð frammanundan, og rokningin bleiv kr. 70.000,-.

Lógargrundarlag:
Ongin viðmerking

Fíggjarligar avleiðingar:
Raðfest er til bátabrúgvar, og rokningin kr. 70.000,- verður goldin av «Havnin Íløga»

Tilmæli:
Verður lagt fyri nevndina til staðfestingar.

HaVN 21-04-2015: Ein meiriluti í nevndini, Óluva Klettskarð, Kristian Eli Zachariasen og Steinbjørn O. Jacobsen tekur málið til eftirtektar. Ein minniluti í nevndini, Herfrí J. Sørensen og Elsebeth Mercedis Gunnleygdóttur tekur støðu í býráðnum..

Býráðsins samtykt 30-04-2015:
Atkvøtt varð fyri minnilutauppskotinum hjá FíN 24-03-2015. Tað fall við 5 atkvøðum fyri (GvK, EÓP, EMG, ASJ og HJS) og 6 ímóti (JS, SOJ, ÓK, JL, SVJ og KEZ).

Síðani varð atkvøtt um at taka undir við býráðssamtyktini 26-03-2015 og meirilutanum í HaVN 21-04-2015. Hetta varð samtykt við 6 atkv. fyri, (JS, SOJ, ÓK, JL, SVJ og KEZ) og 4 ímóti (GvK, EÓP, ASJ og HJS). Ein blonk atkvøða var (EMG).

30/15
15/00310 Umsókn um sundurbýti - matr. nr. 604

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	20.04.2015	39/15	
2 Klaksvíkar Býráð	30.04.2015	30/15	

Frágreiðing um málið:
Eigarin av matr. nr. 604 søkir um loyvi at býta ognina sundur í tveir partar, soleiðis at økið (parturin millum verandi sethús og Vágsheygsgøtu) verður eitt sjálvstøðugt grundøki (sí umsókn dagf. 31.03. 2015).
Matr. nr. er 648 m^2 til víddar og liggur í økisparti A8, har minst loyvda grundstykkjavídd er 300 m^2.

Lógargrundarlag:
Matrikullógin

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar - kommunan ikki partur í málinum.

Tilmæli:
Út frá omanfyrinevnda mælir Tekniska Umsiting til at viðmæla sundurbýti sambært umsókn.

Nevndarsamtyktir:
UBN 20-04-2015: Nevndin tekur undir við tilmælinum frá teknisku umsiting dagfest 13-04-2015.

Býráðsins samtykt 30-04-2015:
Einmælt samtykt at taka undir við UBN 20-04-2015.

KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

31/15
14/00862 Framtíðar skipan av stovninum - Sjálvsognarstovnurin Mylnuhúsið

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Trivnaðarnevndin "Børn & Ung"	21.04.2015	9/15	
2 Fíggjarnevndin	28.04.2015	28/15	
3 Klaksvíkar Býráð	30.04.2015	31/15	

Frágreiðing um málið:
Víst verður til skriv frá umsitingini, dagfest 15. apríl 2015.
Klaksvíkar kommuna hevur móttikið skriv frá stýrinum fyri Sjálvsognarstovnin Mylnuhúsið við áheitan um, at stovnurin framyvir verður skipaður undir Klaksvíkar kommunu sum ein kommunalur stovnur, og at Sjálvsognarstovnurin Mylnuhúsið samstundis verður avtikin, nú 16 ár eru liðin síðan stovnsetanina.

Sjálvsognarstovnurin Mylnuhúsið byrjaði sítt virksemi í januar 1999, og samb. reglugerðina fyri stovnin er í §1, stk. 2, ásett, at: *arbeitt verður fram ímóti, at stovnurin verður kommunalur 10-15 ár eftir stovnsetan.*

Í skrivinum (hjálagt sum undirskjal) verður heitt á kommununa, at yvirtøkan kann verða frá 1. apríl 2015, men av tí at málið krevur politiska viðgerð og samtykt, verður mælt til, at yvirtøkudagurin er í fyrsta lagi tann 1. juni 2015. Samstundis biður stýrið um, at innistandandi peningur hjá stovninum kann verða nýttur til átrokandi ábøtur á bygning og uttanumøki, sum hann eisini upprunaliga er ætlaður til.

Lógargrundarlag:
Reglugerð fyri Sjálvsognarstovnin Mylnuhúsið

Fíggjarligar avleiðingar:
Endaligi roknskapurin fyri Mylnuhúsið er ikki avgreiddur, tað verður avgreitt í næstum.

Tilmæli:
Málið verður við hesum lagt fyri avvarðandi nevndir og býráðið til viðgerðar og støðutakan við tilmæli um at taka undir við, at kommunan yvirtekur Sjálvsognarstovnin Mylnuhúsið pr. 1. juni 2015, og samstundis bindur seg til at yvirtaka alla skyldur, sum frammanundan liggja á stýrinum fyri Mylnuhúsið. Eisini verður mælt til, at innistandandi peningur hjá stovninum, sum upprunaliga er uppspardur til viðlíkahaldsendamál, verður varðveittur til átrokandi ábøtur á bygning og uttanumøki á ognina Mylnugøta 10.

Nevndarsamtyktir:
TrN B&U 21-04-2015: Nevndin tekur undir við tilmælinum dagfest 15-04-2015.

FíN 28-04-2015: Nevndin tekur undir við TrN B&U 21-04-2015.

Býráðsins samtykt 30-04-2015:
Einmælt samtykt at taka undir við FíN 28-04-2015.

KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

32/15
12/01172 Stroyming av býráðsfundum, eftirmeting, apríl 2015

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Fíggjarnevndin	28.04.2015	25/15	
2 Klaksvíkar Býráð	30.04.2015	32/15	

Frágreiðing um málið:
Almennu fundir Klaksvíkar Býráðs hava síðani 24. apríl 2014 verið stroymaðir á alnótini. Býráðið eftirmetti og samtykti 11. sept. 2014, at stroymingin skuldi eftirmetast eftir enn einum hálvum ári. Klaksvíkar kommuna og felagið Raclip skrivaðu í hesum sambandi undir sáttmála 3. okt. 2014 um stroyming við í fyrsta lagi gildi til endan á apríl 2015, tá støða skal takast til framhald av sáttmálanum millum partarnar. Tíðin er nú komin til hesa eftirmeting.

Umsitingarliga hevur samstarvið við Raclip gingið væl. Av tí at talan hevur verið um eina royndartíð, er valt ikki at gera nakrar fastar tekniskar innleggingar. Um valt verður at halda fram við stroymingini, verða nakrar fastar tekniskar innleggingar gjørdar. Talan er ikki um stórar íløgur. Her verður hugsað um ymsar leidningar, sum nú verða lagdir fram og tiknir burtur til hvønn fund. Møguliga eisini okkurt í samband við stýring av mikrofonum á talarapultinum og hjá borgarstjóranum.

Fíggjarligar avleiðingar:
Verður avgjørt at halda fram við at stroyma frá býráðsfundunum, er neyðugt at skipa teknisku viðurskiftini í býráðshøllini meira varandi.

Tilmæli:
Heitt verður á fíggjarnevndina og býráðið um at taka endaliga støðu til, um stroymast skal framhaldandi frá almennu býráðsfundunum.

Nevndarsamtyktir:
FíN 28-04-2015: FíN mælir til, at stroymingin heldur áfram, og at neyðugur tekniskur útbúnaður verður fingin til vega.

Býráðsins samtykt 30-04-2015:
Einmælt samtykt at taka undir við FíN 28-04-2015.

FRAMMANFYRI STANDANDI MÁL ERU VIÐGJØRD Á ALMENNUM FUNDI